haldsfastar Føroyar, prógvar Marjus Dam einamest. Hann er ein sera vælløntur lækni og løgtingsmaður, sum hevur júkað um skattalættar, studning til vinnuna og um at taka avgøld burtur. Hann hevur nú fingið sín vilja - og tískil verður nú ov lítið goldið í okkara felags kassa. Dundrandi undirskot og skert áræði millum fólk er úrslitið. Hevði Marjus Dam ikki havt peningin, sum vit spardu upp til eitt sjálvstøðugt samfelag, so var landsstýrið langt síðani farið at læna pengar uttanlands aftur.

Og hvat sigur Marjus Dam so? Vil hann lata meira til eitt samhaldsfast samfelag? Vil hann siga frá sær ein skattalætta, har menn sum hann og eg sjálvur skulu hava 50.000 krónur beinleiðis í lumman afturat um árið, meðan ein vanlig verkamannafamilja fær 2.000 krónur?

Sigur Marjus Dam, at okkara eldra ættarlið, sum hevur bygt hetta landið og sum hevur latið hundraðfalt til okkara felags kassa, skal njóta ágóðan av tí, tey sjálvi hava bygt upp og goldið?

Nei, danir skulu gjalda! Vit mugu fara til Danmarkar at biðja um pengar. Tí so kunnu Marjus Dam, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin halda fram við at geva studning og skattalættar, og vit vælbjargaðu kunnu halda fram at koyra í stórum bilum og á motorsúkklum.

Tey eldru í Føroyum eru sambært Marjusi Dam ein byrða, og tey hava ikki sjálvi goldið fyri sína pensión ella sín røktartørv - nei, danir hava goldið, sigur Marjus! Og uttan danskar pengar, hava tey eldru ongi rættindi í Føroyum, sambært sambandshugsjónini.

**Niðrar tey eldru - spillir ungdómin**

Hvat er hetta fyri hugsan? Hetta er so ábyrgdarleyst og gongur so ímóti øllum samfelagssinni og samhaldsfesti, at eg fái beinleiðis ilt av hoyra slíkt. Og at fólkavaldir menn og heilir politiskir flokkar kunnu fáa seg at trútta sovorðnan boðskap niður í okkara eldru og okkara uppvaksandi ættarlið, er mær ovboðið. Hetta er ein tileggjan til sjálvsøkni, máttloysi og ábyrgdarloysi millum fólk. Og hetta elvir við vissu til skilaloysi í landsins stýri.

Hetta hava vit fingið prógv um so seint sum fyri tíggju árum síðani. Við fullum blokstuðli vórðu tey veikastu og tann vanligi føroyingurin slept upp á fjall. Og at sitandi samgonga ætlar at endurtaka bragdið - ja, um tað gongur sjón fyri søgn.

Tey eldru í Føroyum eru ikki ein byrða, sum vit mugu bidda um pening til uttanlands. Tey hava goldið hundrað- ella túsundfalt tað til samfelagið, sum eitt virðiligt lív á ellisárum kostar samfelagnum. Um vit bert seta pengar av til sosiala trygd og eldrarøkt, burturav tí, sum hvørt ættarlið sjálvt skapar, so hava øll møguleikan fyri einum virðiligum lívi á hesum klettum.

**Trýr nakar sambandsmonnunum?**

Havi hitt og tosað við nógv fólk, ið hava hug at siga sum Helgi og Marjus - ja, høvdu vit nú bara ikki havt skorið blokkin, so hevði slíkt ikki hent, sum nú hendir. Eg eri tó vísur í, at ongin tá samanum kemur, meinar hetta av hjarta. Øll vita, at høvdu vit ikki havt minkað blokkstuðulin og vóru farin undir at raðfesta okkara egnu fíggjarorku, so høvdu tey eldru og brekaðu ikki fingið nakra stórvegis betring undanfarnu árini. Hinvegin høvdu studningar, skattalættar og ábyrgdarloysi langt síðani verið farnir avstað við øllum tí, ið vit hava bygt upp - og landið hevði veruliga verið á veg móti næstu kreppuni.

**Blaka uppsparingina burtur**

Núverandi samgonga dúvar uppá tann pening vit settu til viks, undanfarnu seks árini. Sera harmiligt, at hesir pengar nú verða nýttir til asosialan politikk og vánaliga búskapar- og fíggjarstýring. Vit rindaðu stóru uttanlandsskuldina hjá landinum meira enn niður í helvt. Nú eru vit aftur á veg at skuldarbinda okkum.

Men sum Marjus Dam sigur: Hví vísa ábyrgd og gjalda í felag, tá vit ístaðin kunnu biðja danir um pengarnar? Hví vera samhaldsfastur, tá tú ókeypis kann senda rokningina fyri rættindini hjá okkara eldru til Danmarkar? Hví ikki geva reiðarum studning, tá vit afturfyri fáa danir at gjalda tað til tað, sum krevur samhaldsfesti og virðing fyri teimum, ið hava bygt landið?

Δ

# Óbrúkilig skipan

TINGHELLU-KLUMMAN
*Finnbogi Ísakson*
*finnbogi@post.olivant.fo*



Nú verður landið aftur herjað av einum verkfalli, sum rakar samfelagið meint. Einir 40 maskinmenn hjá SEV eru farnir í verkfall, og tað rakar alt meginøkið og meira aftrat. Fyri eina ferð skyld er tað Suðuroyggin, sum er sloppin undan.

Fyrst av øllum er hetta aftur eitt prógv um, at okkara arbeiðsmarknaður er ikki nóg væl skipaður. Tað kemur ikki fyri í okkara grannalondum, at verkføll eru so títt og raka so meint sum her. Her vantar eitt regluverk fyri, nær verkfall kann lýsast, og eisini vantar ein arbeiðsrættur.

Tað skal so lítið til fyri at leggja mestsum alt samfelagið lamið. Í hesum førinum eini 40 fólk. Fer Starvsmannafelagið í verkfall, umfatar tað eisini Strandferðsluna, og tá liggur samfelagið so púra lamið. Onkuntíð hevur verið talan verið um at gjørt nóg nógvar av manningunum á Strandferðslsuni til tænastumenn, sum jú ongan verkfallsrætt hava, men einki hevur spurst burturúr.

Tað er ikki minni neyðugt at gera so mikið nógv fólk hjá SEV til tænastumenn, at eitt nú Sundsverkið ikki kann verða lagt stilt sum liður í einari arbeiðsósemju.

So eru tað lønirnar, sum eru ringar at halda stýr á. Føroya Arbeiðarafelag gekk í ár við til null-lønarvøkstur, men fekk nakað upp á eftirlønina. Landsstýrismaðurin í lønarmálum hevur sagt seg stílað fram ímóti einari nullloysn á almenna arbeiðsmarknaðinum eisini.

Men so kemur sperðil í, tí SEV ger avtalu við maskinmenninar um eina lønarhækking upp á 3-5% yvir 2 1/2 ár. Og landsstýrismaðurin skal góðkenna avtaluna - ella vraka hana.

Hetta ósamsvar er ikki heilt nýtt. Fyri fáum árum síðani gjørdi Føroya Tele eina lønaravtalu, sum lá væl oman fyri tað, sum Landsstýrið hevði hugsað sær at gjørt fyri almenna arbeiðsmarknaðin. Men hóast tað almenna eigur Føroya Tele við húð og hár, er ongin treyt ásett har um, at Landsstýrið skal góðkenna ein lønarsáttmála.

Neyvan kann tað vera rætt, at feløg, sum tað almenna eigur 100%, samráðast fyri seg, uttan at Landsstýrið hevur nakað at skula hava sagt. Tað skapar ólag í almenna lønarlagnum.

Men skipanin við SEV er tað mest óbrúkiliga. Nú hava partarnir - Maskinmeistarafelagið og SEV - havt drúgvar samráðingar, og Semingsstovnurin hevur verið uppií. Í fyrstu atløgu legði Semingsstovnurin einki uppskot fram, tí Turið Debes Hentze og Jákup í Gerðinum hildu tað ikki loysa seg at koma við einum uppskoti, tí tað var so langt ímillum partarnar.

Tað gekk tó ikki eitt samdøgur, so komu partarnir saman aftur, og semingsmenninir komu eisini uppí aftur. Semingsstovnurin legði eitt semingsuppskot fram, sum bæði maskinmeistarar og leiðslan í SEV kundu góðtaka.

Her skuldi so alt endað í frið og náðum, um vanliga skipanin fyri samráðingar á arbeiðsmarknaðinum vóru galdandi í hesum førinum sum í øðrum.

Tað er bara tað, at sama skipan er ikki galdandi. Tá partarnir at enda hava gjørt eina semju, skal hon leggjast fyri landsstýrismannin í fíggjarmálum til góðkenningar. Hansara niðurstøða var, at lønarhækkingin lá so langt oman fyri tað nullið, hann hevði hugsað sær, at hann vildi ikki góðkenna avtaluna.

Úrslitið er, at maskinmenninir eru farnir í verkfall, og at streymurin verður slitin í ávísum tíðarskeiðum um alt landið. Til miklan ampa bæði fyri vinnulívið og privatfólk.

Virkandi løgmaðurin Bjarni Djurholm hevur sagt, at ein møguleiki er, at Løgtingið leggur uppí. Er tað ein møguleiki? Hvat skal Løgtingið gera? Alt tað, eg veit um, hevur Løgtingið - við einum undantaki - gjørt eitt semingsuppskot til lóg, tá Tingið hevur lagt upp í arbeiðsósemjur. Hesaferð kann Tingið so samtykkja eitt semingsuppskot, sum samráðingarpartarnir hava góðkent, men ikki Landsstýrið. Er tað eina slíka samtykt, Landsstýrið ætlar at biða Tingið um?

Tað er ein hopleys skipan, at tveir partar á arbeiðsmarknaðinum samráðast um ein sáttmála, sum ein triði partur so kann góðkenna ella vraka. Hatta ber ikki til, rætt og slætt. Er tað meiningin, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum skal hava evsta orðið um lønarviðurskiftini hjá SEV, so muga lønarsamráðingarnar eisini vera millum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið - við SEV sum hjásitara. Ella eru tað tann interkommunali felagsskapurin SEV, sum samráðist við fakfeløgini, og avtalur teirra millum eru endaligar og bindandi.

Verandi skipan er óbrúkilig.

# Avmarkandi og niðurbindandi karmar

TINGHELLU-VIÐMERKINGIN
*Kjartan Hoydal*



Í Tinghelluklunnuni leygardagin rakar mín góði vinur Thomas Arabo høvdið á seymin tá hann skrivar soleiðis:

"Atli Dam, sáli, plagdi mangan at siga at heimastýrislógin kundi tambast so nógv at hon rakk líka at loysingini. Hann var eisini óførur at tamba hana. Undir hansara leiðslu rukku vit fleiri mál á sjálvstýrisleið, sum í fyrstu atløgu sóu ómøgulig út. Best minnast vit nokk undirgrundaravtaluna, eitt ótal av fiskiveiðusátmálum, ræðisrætt á flogferðsluni og so framvegis."

Hetta er tað sum eg sjálvur havi hoyrt frá Atla, ferð eftir ferð. Hinvegin havi eg ongantíð hoyrt hann leggja dent á at fáa eina nýggja sjálvsstýrislóg. Hann var sjálvur besta dømið um, at tørvur var ikki á henni, tí tað Føroyar høvdu dugnalig samráðingarfólk, sum skiltu verulig føroysk áhugamál, so bar til at berja seg í gjøgnum, júst tí heimastýrislógin ikki beinleiðis forðaði, men kundi tulkast.

Mangur við mær má tí hava undrast á, hví núverandi samgonga hevur havt sovorðnan skund at gera júst tað sum forðar tamban, tá samgongan ikki ætlar sær at gera broytingar í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar. Danir hava altíð kunnað tambað og fara framhaldandi at gera tað tá teir hava tørv á tí.

Danskir umsitingarligir og politiskir myndugleikar hava altíð ynskt at fest niður á blað, tað sum Føroyar skulu sleppa ella ikki sleppa undir Heimastýrislógini. Hetta fingu teir ikki gjørt í 1946 -47 av politiskum grundum. Hvussu altráir danskir myndugleikar eru í hesum, sóu vit sí kanska greiðast mánaðarskifti januar - februar 1993, tá ein føroysk sendinevnd við Maritu Petersen, sálu, á odda fekk ein drúgvan lista frá donskum politikarum og embætisverki, sum skuldi avmarka møguleikum hjá føroyskum myndugleikum at føra sín egna politik á nógvum økjum, sum Føroyar høvdu røkt higartil. Føroysku samráðingarfólkini søgdu tá undir allarringastu kreppu nei til at ganga hesa leið. Hvat er broytt í dag ?